Flogmýs í Føroyum:

# Fremmandur gestur ger innrás



**Dorete Bloch**
doreteb@savn.fo



**Jens-Kjeld Jensen**
jkjensen@olivant.fo

Flogmýs í Føroyum, ja, tað ljóðar sum ein skemtisøga! Men ein grein úr altjóða tíðarritinum Acta Chiropterologic hevur savnað allar flogmýs, sum eru sæddar í Norðsjónum. Umrøddar eru flogmýs, ið til og við 2012 vórðu sæddar í Føroyum, Íslandi, Orknoyggjum, Hetlandi og á boripallum í Norðsjónum. Hetta er gjørt í samstarvi millum granskarar í Íslandi, Skotlandi og Føroyum.

12 ymisk sløg eru greinað. Fýra sløg eru komin úr Amerika til Íslands, meðan hini átta sløgini eru evropeisk. Av teimum 12 sløgunum eru fimm ymisk funnin í Føroyum, í Hetlandi og Orknoyggjum, seks á boripallum og átta í Íslandi.



Trøllflogmús

Ein av gátunum hevur verið, hvussu flogmúsin kom til Føroyar og onnur oyggjalond í Norðurhøvum. Hendinga ferð vita vit, at flogmús er lend á skipi og á henda hátt komin um hav. Men tær flestu hava ivaleyst flogið sjálvar. Tær flogmýs, ið hava langar, smalar veingir, eru oftast flytiflogmýs, ið ferðast millum eitt reiðrarstað og eitt vetrarbøli, eins og galdandi er fyri flytifugl. Vit tosa millum annað um Leislerflogmús og Trøllflogmús.

Tær støðufastari flogmýsnar hava rundari veingir. Her er til dømis talan um Norðflogmús og Niðuflogmús.

Øll sløgini eru vilst henda vegin. Líkindi eru ikki hjá flogmús at liva í Føroyum – ikki enn í øllum førum. Við okkara kalda og óstøðuga veðurlagi er ikki grundarlag fyri, at flogmýs kunnu útvega sær nóg mikið av føði um summarið, og veturin er ov heitur til, at tær kunnu fara í dvala.

## Flogmýs nærum gerandiskostur

Tann fyrsta fráboðanin um flogmús í Føroyum kom frá Eyðuni Winther umleið 1964 á Trøðum á Sandi. Men talið av sæddum flogmúsum er vaksið tey seinastu tríati árini. Niels á Botni og pápi hansara, Petur á Botni, eygleiddu báðir djóralívið í Nólsoy




**HEIMILDIR:**

**Dietz, C., Helversen, C.O. von and Nill, D.** 2009. *Bats of Britain, Europe and northwest Africa.* A. and C. Black Publishers Ltd. London. 400 pp.

**Petersen, A, Jensen, J-K., Jenkins, P., Bloch, D. and Ingimarsson, F.** 2014. A review of the occurrence of bats (Chiroptera) on islands in the North East Atlantic and on North Sea installations. *Acta Chiropterologica* 16,1: 169-195.

seinastu 150 árini, og fyrsta flogmúsin varð sædd í 1987. Eftir tað eru 25 sæddar í Nólsoynni í tíðarskeiðinum 2000-2009.

Vanliga sæst bara ein flogmús hvørja ferð, men í einum av hesum førinum eru upp til 12 sæddar samstundis. Í 2010 høvdu vit eina innrás av flogmúsum í Føroyum, tá minst 45 vórðu sæddar. Áleið 70 ymiskar fráboðanir um flogmýs komu hetta árið. Flestu flogmýs hava verið sæddar um heystið, færri um várið.

## Tey fimm sløgini, ið eru funnin í Føroyum

**Norðflogmús** (*Eptesicus nilssonii*) er sædd eina ferð. Kroppurin er 48-54 mm og vigar 8-13 gramm. Norðflogmúsin er tann vanligsta flogmúsin í Norðurlondum og er funnin heilt norður til pólkringin.

**Niðuflogmús** (*Eptesicus serotinus*) er somuleiðis bara sædd eina ferð. Niðuflogmúsin er eitt sindur størri enn Norðflogmúsin. Kroppurin er 62-80 mm langur og vigar 17-35 gramm. Flogmúsin var funnin í eini timburgoymslu. Niðuflogmúsin livir annars í øllum Evropa norður til 55°.

**Leislerflogmús** (*Nyctalus leisleri*) er eisini bara sædd eina ferð her. Hetta er ein stór flogmús við einum kroppi millum 54-64 mm og eini vekt, sum er 14-20 gramm. Flogmúsin er ikki vanlig og finst mest í Onglandi og Írlandi og norður til Skotlands, har hon er sjáldsom. Hetta slagið flýgur eisini um dagin.

**Trøllflogmús** (*Pipistrellus nathusii*), sí mynd, er funnin 17 ferðir í Føroyum. Flogmúsin er long, 44-48 mm, kløn og vigar bara 6-9 gramm. Útbreiðslan er mest í landssynningspartinum av Evropa, men slagið hevur breitt seg norður eftir, og eigur í dag bæði í Danmark og Onglandi.

**Hýggiflogmús**, sí mynd (*Vespertilio murinus*), er funnin tvær ferðir her. Kroppurin er 55-63 mm langur og vigar 12-14 gramm. Hýggiflogmúsin er tann næstvanligsta í Norðurhøvum aftan á Trøllflogmúsina. Finst eins og Trøllflogmúsin mest í landssynningspartinum av Evropa, men tó eisini í syðra parti av Norra og Svøríki.

Vit vilja sera fegin hoyra um flogmýs. Vit hava nú eitt tól, ið tekur upp flogmúsaljóð, og vit eru tí før fyri at greina slagið á ljóðinum. Áhugað kunnu útvega sær greinina frá *Acta Chiropterologica* við at venda sær til ein av rithøvundunum.

### Faktaboks:

Flogmýs hava verið til í 70 mill. ár. Í dag finnast meira enn 1.100 sløg, og 51 av teimum eru funnin í Evropa og Norðurafrika.

Flogmús eitur Chiroptera í djórafrøðini, og er tað einasta súgdjórið, ið ikki hevur lús!

Sløgini í Útnorðri liva øll av skordjórum, men aðrastaðni eta tey sera ymiska føði sum frukt, skriðdjór, smærri súgdjór og eisini fisk. Tann kendasta er vampýr flogmúsin, ið drekkir blóð.

Flestu flogmýsnar flúgva í myrkri, og sjálv um tær hava eygu, stýra tær við høgum ljóðbylgjum, sum menniskju í flestum førum ikki hoyra. Við ljóðbylgjum kunnu tær stýra uttan um alt, ið forðar teimum á leiðini, og hvørt flogmúsaslag hevur sína egnu ljóðmynd. Tí er tað møguligt hjá okkum at kenna sløgini aftur á ljóðmyndini.